## Gongur væl hjá Christiani

Havnamaðurin Christian Restorff Mouritsen hevur seinastu vikurnar roynt seg á eykaliðnum hjá Manchester City. Herfyri fekk Christian ein yrkissáttmála við Manchester City, og tað gongur støðugt fram á hjá honum í felagnum. Christian hevur nú fingið nógva spælitíð á eykaliðnum hjá Manchester City, og eisini har hevur hann staðið seg væl.

## Marion Jones fríkend

Trífaldi olympski gullvinnarin Marion Jones var mikudagin fríkend fyri allar ákærur um doping. Ein roynd hevði víst, at EPO var at finna í kroppinum hjá henni, men ein nýggj roynd, ein sokallað B-roynd, vísti hinvegin, at hetta evni ikki var í kroppinum. 30 ára gamli rennarin var tikin fyri doping undir amerikansku meistaraskapunum í juni mánaði, men nú er hon reinsað.

– Eg eri overfegin. Eg havi allatíðina sagt, at eg havi ikki brúkt stimbrandi evni, og eg eri fegin um, at vísundin nú hevur prógvað hetta, sigur Marion Jones í eini fráboðan.

## Asaf fær 25.000 fyri hvørt sekund

Rennarin Asaf Powel hevur í ár vunnið renningina á 100 metrum í øllum seks Golden League-kappingunum, har virðislønirnar eru stórar peningaupphæddir. Verða premiupengarnir frá hesum seks sigrum lagdir saman og býttir út á hvørt sekund, sum Powel hevur runnið í kappingunum, so hevur hann vunnið næstan 25.000 krónur fyri hvørt sekund.

### Formuladeildin

| | | | |
|---|---|---|---|
| 10/9 | GÍ-HB | Michael Johansen |
| 10/9 | B36-B68 | Jens P. Brattalíð |
| 10/9 | VB/S-EB/Str | Ransin N. Djurhuus |
| 10/9 | KÍ-ÍF | Eiler Rasmussen |
| 11/9 | Skála-NSÍ | Páll Augustinussen |

### 1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 9/9 | B71-AB | Rúni Gaardbo |
| 9/9 | KÍ-Royn | Milan Cimburovic |
| 9/9 | TB-HB | Lars Muller |
| 9/9 | LÍF-FSV04 | Jón Kári í Brekkuni |

### 1. deild kvinnur – FM-bólkur

| | | |
|---|---|---|
| 10/9 | GÍ-EB/Streymur | Eugen Voda |
| 10/9 | KÍ-AB | Bárður Mortensen |

### 1. deild kvinnur – B-bólkur

| | | |
|---|---|---|
| 10/9 | SÍ-NSÍ | Poul Heri Selfoss |
| 10/9 | HB-B36 | Thorvald J. Petersen |

# Undarlig støða í Fuglafirði

**Klaksvíkingar hava nógv at prógva fyri sær sjálvum á heimavølli, og í Fuglafirði ávirkar tað manningina, at dysturin móti GÍ skal spælast umaftur**

KÍ-ÍF

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hagtølini eru ímóti báðum feløgunum, tá ið ÍF sunnudagin fer til Klaksvíkar. Illa sperda ÍF hevur bara eina ferð í ár megnað at fingið fulla úrtøku burturúr á útivølli. Teir vunnu fyrr í ár 2-1 á Skála.

Í Klaksvík, har tað hjá heimaliðnum áður var langt millum stigamissirnar, er støðan nógv broytt. Higartil í ár hevur KÍ spælt tíggju landskappingardystir á heimavølli.Bara í tveimum førum hevur tað eydnast at fáa øll stigini. KÍ vann 3-0 á VB/Sumba og 2-1 á Skála í Klaksvík.

Um tað verður farið eitt sindur aftur í tíðina, so kom tað meiri enn so fyri, at tað gingu ár ímillum, at KÍ misti stig á heimavølli.

Klaksvíkingar eru nýggju stig frá oddasessinum. Teir siga seg ikki heilt at hava mist mótið um, at tað skal eydnast at fáa fatur á FM – í síðsta umfari skulu teir spæla á Mølini. Undir øllum umstøðum hava teir heiðursmerkir og altjóða luttøku at spæla fyri.

Eftir útvísingina á Toftum er Marek Wierzbicki leikbannaður. Harley Bertholdsen er tøkur aftur eftir leikbannið næstsíðsta sunnudag. Oddmar á Lakjuni hevur ikki verið við í fleiri vikur, tí hann hevur verið skaddur. Nú hevur hann vant aftur við fullari ferð.



*Hagtølini eru ímóti báðum feløgunum, tá ið ÍF sunnudagin fer til Klaksvíkar. Illa sperda ÍF hevur bara eina ferð í ár megnað at fingið fulla úrtøku burturúr á útivølli, og KÍ hevur bara tvær ferðir vunnið heima í ár*

**Marghjáttligt**

Í Fuglafirði er manningarliga støðan øðrvísi, enn hon oftast hevur verið, og tað verður ivaleyst sjáldan, at henda støðan fer at koma í aftur. ÍF hevur mist eitt stig orsaka av avgerðini hjá kappingarnevndini um, at dysturin móti GÍ, sum endaði 2-2, skal spælast umaftur. Tað ber tó møguleika við sær at vinna tvey stig fleiri, enn teir í fyrru royndini vunnu móti GÍ.

Móti GÍ var Tórður Lervig, sum fyrr í ár flutti úr Klaksvík og til Fuglafirðar at spæla, leikbannaður. Nú verður alt strikað frá tí dystinum, og tí skal Tórður sita sama leikbannið móti KÍ, sum hann hevði móti GÍ!

Í dystinum móti GÍ fekk Høgni Zachariassen gula kortið. Tað átti at borið leikbann við sær móti KÍ. Men nú er gula kortið strikað, og so sleppur Høgni Zachariassen at spæla í Klaksvík!

# Fjúsið er stutt í Italia

**Venjarin hjá Torino hevur fingið sekk tríggjar dagar undan fyrsta dystinum í nýggja kappingarínum**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað gongur ofta skjótt upp og niður í fótbólti, og tá ið tað snýr seg um venjarar, er fjúsið hjá leiðslunum í fótbóltsfeløgunum ofta stutt.

Tað má venjarin Gianni De Biasi sanna, nú hann hevur fingið sekkin í italska felagnum Torini áðrenn kappingin yvirhøvur er byrjað.

De Biasi hevur verið í hornatøkum við formanninum í felagnum, og tá ið liðið samstundis hevur fingið vánalig úrlit í venjingardystum undan kappingini, hevur leiðslan í Tornio sagt venjaran úr starvinum.

Nýggjur venjari er longu funnin, og tað er Zaccheroni, sum áður hevur vant feløg sum Lazio, Udinese og AC Milan. Fyrsta uppgávan hjá honum er dystur ímóti Parma sunnudagin.

**Landsliðsvenjarin givin**

Úrslitini í EM-dystunum hava havt ta avleiðing, at landsliðsvenjarin hjá Bosnia-Herzogovina, hevur sagt upp. Bosnia spældi ímóti Ungarn mikukvøldið og tapti 3-1.

– Eg havi sagt upp av moralskum orsøkum. Eg geri tað tíðliga í EM-kappingini, og avloysarin hjá mær kann gera nakað við liðið, sigur Blas Sliskovic.

Sliskovic hevur vant bosniska landsliðið í fýra og eitt hálvt ár.

**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 21 | 13 | - | 5 | - | 3 | 52 | 23 | 29 | 44 |
| 2 B36 | 21 | 11 | - | 6 | - | 4 | 35 | 23 | 12 | 39 |
| 3 HB | 21 | 10 | - | 7 | - | 4 | 45 | 33 | 12 | 37 |
| 4 KÍ | 21 | 9 | - | 8 | - | 4 | 45 | 28 | 17 | 35 |
| 5 NSÍ | 21 | 10 | - | 5 | - | 6 | 42 | 30 | 12 | 35 |
| 6 GÍ | 20 | 7 | - | 10 | - | 3 | 25 | 20 | 5 | 31 |
| 7 Skála | 21 | 6 | - | 6 | - | 9 | 27 | 23 | 4 | 24 |
| 8 VB/S | 21 | 4 | - | 4 | - | 13 | 18 | 56 | -38 | 16 |
| 9 B68 | 21 | 2 | - | 5 | - | 14 | 23 | 48 | -25 | 11 |
| 10 ÍF | 20 | 2 | - | 4 | - | 14 | 19 | 47 | -28 | 10 |

**1. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B71 | 19 | 14 | - | 3 | - | 2 | 61 | 21 | 40 | 45 |
| 2 AB | 18 | 13 | - | 1 | - | 4 | 52 | 25 | 27 | 40 |
| 3 LÍF | 19 | 11 | - | 3 | - | 5 | 42 | 23 | 19 | 36 |
| 4 TB | 19 | 11 | - | 3 | - | 5 | 38 | 28 | 10 | 36 |
| 5 FSV04 | 18 | 8 | - | 1 | - | 9 | 28 | 24 | 4 | 25 |
| 6 KÍ | 19 | 7 | - | 2 | - | 10 | 39 | 62 | -23 | 23 |
| 7 HB | 18 | 5 | - | 3 | - | 10 | 36 | 45 | -9 | 18 |
| 8 SÍ | 19 | 5 | - | 2 | - | 12 | 46 | 56 | -10 | 17 |
| 9 Royn | 19 | 0 | - | 2 | - | 17 | 12 | 70 | -58 | 2 |